EIGUR TÚ EITT

# SUMMARHÚS?

Vit sóknast eftir húsum/íbúðum við 4-6 seingjarplássum, ið vit kunna leiga til útlendsk ferðandi í Føroyum **í tíðarskeiðinum 1. juni til 1. september 2008**.

Hús/íbúðir, ið vit sóknast eftir, eru í høvuðsstaðarøkinum og á Streymoy annars. Her hugsa vit um Leynar, Stykkið, Kvívík, Vestmanna, Kollafjørð og norður til brúnna.

Um tú hevur eini summarhús ella íbúð, ið tú kundi hugsað tær at leiga út, ert tú vælkomin at ringja til okkum ella senda okkum ein t-post.



**Green Gate Incoming**
THE FAROE ISLANDS DESTINATION COMPANY

J. Broncks gøta 35
FO-100 Tórshavn
Tel +298 350 520
Fax +298 350 521
info@greengate.fo
www.greengate.fo

---

almannastovan
www.almannastovan.fo



## Dagstovnurin REIÐRIÐ søkir starvsfólk

Søkt verður eftir einum avloysara og einum starvsfólki til Dagstovnin Reiðrið á Saltnesi. Vit vænta at tú hevur viðkomandi útbúgving so sum námsfrøðingur, fysioterapeutur, ergoterapeutur, sjúkrarøktarfrøðingur, ella aðrar drúgvar viðkomandi royndir á økinum.

Størvini verða sett við einum vikuligum tímatali uppá 30 tímar. Avloysarastarvið er frá 1. juli 2008 til 1. juli 2009 og hitt starvið er frá 1. apríl 2008.

Vit ynskja at tú ert virkin og nýhugsandi, hevur góð samstarvsevni og kanst arbeiða sjálvstøðugt við at loysa uppgávurnar, í samsvari við endamálið hjá stovninum og teir málsetningar stovnurin hevur.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Hannu Juul, leiðara, á telefon 447003.

Setanartreytirnar eru eftir avvarðandi fakfelagi.

Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 11. mars 2008, kl. 12.

Send umsóknina til:
Almannastovan, Smyrilsvegur 20
Postboks 3096, 110 Tórshavn.

Dagstovnurin Reiðrið er ein dagstovnur fyri fjølbrekað børn og ung undir 18 ár, har møguleiki eisini er fyri umlætting. Endamálið hjá Reiðrinum er at skapa eitt trygt grundarlag fyri børnini, at tey kenna seg væl, verða vird, eru við í sosalari samveru og fáa eitt mennandi tilboð, saman við neyðugu venjingunum. Reiðrið er ein dagstovnur undir Almannastovuni. Á stovninum eru 8 børn og ung.

KREA

---

Pf. Svend Krosstein www.krosstein.fo




**P/F Svend Krosstein** er ein fyritøka í støðugari menning, sum í løtuni hevur 20 fólk í fulltíðarstarvi. P/F Svend Krosstein er einasta HVS-heilsøla í Føroyum og hevur harafturat største HVS-handilin í landinum. Vit selja alt tilfar til vatnveitingar, hitaverk, sanitet og ventilatión. Eisini selja vit byrsur, patrónir, fiskireiðskap og annað.

# Lærlingur søkist

## Kundi tú hugsað tær eina framtíð innan handilsyrkið?

Vit hava pláss fyri einum lærlingi (m/k) í fyritøku okkara.

**Vit kunnu bjóða tær:**

- Eitt avbjóðandi starv í eini spennandi vinnu í støðugari menning
- Eitt starv, har tú gerst partur av einum góðum toymi, har arbeiðsandin er av teim bestu og fokus verður sett á trivnaðin hjá tí einstaka starvsfólkinum
- Tryggar arbeiðsumstøður
- Góðar møguleikar fyri persónligari menning

Tú mást hava HH ella FHS prógv.

Lærutíðin er ávikavist 2 ella 3 ár.

Tú mást vera fryntlig/-ur, samstarvsáhugað/-ur, ágrýtin og til reiðar at taka við nýggjum lærdómi.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til okkara og tosa við Jógvan Magnussen, handilsleiðara ella Anniku Krosstein, stjóra. Umsóknarfreistin er 1. mars 2008.

Er hetta nakað fyri teg, so send okkum eina umsókn saman við prógvum og viðmælum til:

**P/F Svend Krosstein**
**Postboks 3229**
**FO-110 Tórshavn**
**Viðm: Lærupláss**

Svend Krosstein P/F
Falkavegur 6 · FO-100 Tórshavn · Tel. 34 46 00
Fax. 34 46 01 · T-post: krosstein@krosstein.fo

---

IVECO lastbilar | IVECO vørubilar | IRISBUS bussar | METEK verkstaður



## Lastbilalærlingar til Metek

Vegna vaksandi virksemi sóknast vit eftir tveimum tveimum lastbilalærlingum til verkstað okkara at byrja skjótast til ber. Løn sambært avtalu.

Avrit av umsókn og viðkomandi skjølum kunnu sendast við vanligum brævi til Metek, Postsmoga 1330, 110 Tórshavn, ella við teldubrævi til metek@post.olivant.fo. Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 7. mars 2008.

Fleiri upplýsingar um størvini fáast við at ringja til Boga í Gil, tlf. 28 10 52, ella til Eyðbjørn Johansen, tlf. 28 10 53.

METEK
Smyrilsvegur 10
Postsmoga 1330
FO-110 Tórshavn

SENDISTOVAN